Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Nr. 12/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um íløgujáttan til Ítróttaháskúlan í Vági, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52 a)

1. Er ætlanin at játta 3 mió. kr. í íløgupeningi til Ítróttaháskúlan, soleiðis at skúlin fær nøktandi hølisumstøður, og møguleika at taka fleiri næmingar inn?
2. Um ja, nær er ætlanin at játta peningin?
3. Er samskifti millum uttanríkis- og mentamálaráðið og Ítróttaháskúlan um nýggja skúlabygningin?

Viðmerkingar:

Ítróttaháskúlin hevur frá fyrsta degi verið ein sólskinssøga. Nógvir ungdómar bæði úr Føroyum og úr útlondum hava luttikið á skúlaskeiðunum, og ein rød av spennandi og mennandi størvum eru skapt. Umframt góðu upplivingarnar, næmingarnar fáa, kemur jaliga ávirkanin, skúlin hevur á nærumhvørvi.

Seinni í ár stendur eftir ætlan eitt nýtt næmingaheim klárt. Hetta gevur grundarlag fyri at taka enn fleiri næmingar inn, umframt at skúlin hevur nógvar umsóknir. Nú næmingaheimið er við at vera klárt er tíðin búgvin til at fara í gongd við verkætlanina um at byggja/umbyggja hóskandi skúlahølir til virksemið. Sum er hevur skúlin ikki egin hølir, men húsast í Stóra Pakkhúsi.

Sum skilst er lagt upp til, at Ítróttaháskúlin somuleiðis skal útvega 3 mió. kr. til skúlabygningin. Mín fatan er, at hesin partur av ætlanini er klárur.

Til skúlaskeiðið á vári 2021 er næmingaheim tøkt umframt nokk av umsøkjarum. Avbjóðingin tá verður skúlahølini. Tí hesir spurningar til landsstýrismannin.

Á Løgtingi, 2. september 2020

Sirið Stenberg